VALGREINAR

# At gera tað, tú ert best til

**Finnur Jensen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Suðurstreymoy*



Tað skal fáast meira burturúr skúlagongdini hjá tí einstaka. Vegurin eigur at gerast greiðari og tørvurin hjá einstaklinginum skal standa ovast á dagsskránni.

Tað harmar meg, tá ungfólk kasta seg út í skúlagongd, uttan at tey vita, hví ella hvat tey ætla sær.

Sjálvur gekk eg á studentaskúla, har tað vóru nógv, ið fóru og komu, tí endamálið tóktist ókent. Eisini hóraðu nøkur, sum kortini ikki høvdu fingið svarið upp á spurningin um seg sjálvan. Tað er sjálvandi ikki lætt hjá øllum teimum mongu ungu, sum ferðast á útbúgvingarbreytini.

Eg havi nú havt eitt lítið ár at líta afturá hesa skipanina fyri miðnámsskúlum, og tað er ikki alt gott, er sær.

Til tess, at øll hesi skulu finna seg betri til rættis, so er neyðugt við vegleiðing. Tað er ikki lætt at velja, men tað er so uppgávan hjá landsins myndugleikum at vegleiða longu, áðrenn avgerðin verður tikin, tí hetta er størsta íløga, vit yvirhøvur gera.

Ein og hvør skal tæna sær sjálvum og samfelag sínum sum best, og tað ger hann sjálvandi við at gera tað, hann er bestur til. Tað er hvør einstøk virðisskapan frá einstaklinginum, ið skapar framburð. Valið skal tí vera tað rætta. At velja røttu breytina.

Tað er rætt, at vit skulu seta krøv, men fyrst skulu vit geva hvørjum einstøkum møguleikan.

Hetta fari eg - fái eg møguleikan - at arbeiða fyri.

# Hjálp - og skjóta hjálp

**Rógvi Borðoy**
*Valevni fyri Fólkaflokkin í Eysturoy*

Fólkaflokkurin hevur framt eina stóra hækking av pensjónum og eina víðkaða heimarøkt í verki í seinasta valskeið.

Samstundis sum talið av bæði fyrrtíðar- og pensjónistum er lækkað síðani 1997, eru samlaðu pensjónirnar hækkaðar við 198,7 mió kr. Heimarøktin hevur fingið 3,9 mió. kr. meiri at hava um hendi.

Eisini hevur Fólkaflokkurin stuðlað alternativum bústaðarmøguleikum, sum eldraíbúðir, sum kommunurnar longu eru í holt við.

Eldri fólk, sum ikki hava tørv á stórum sethúsum longur, kunna við at selja húsini flyta inn í minni og bíligari eldraíbúðir, og samstundis kunna ung, ið vilja seta búgv, keypa sethúsini.

Kortini skal eldra fólkið kunna búgva heima sum longst, og heimarøktin skal leggjast til rættis eftir tí.

Sum heild vil Fólkaflokkurin arbeiða fyri at politikkurin kemur so tætt at borgaranum sum gjørligt.

Við at geva kommununum meiri vald á eldra- og barnaansingarøkinum, kemur vanligi borgarin betri til sín rætt betri enn um landið skal umsita málini.

Fólkaflokkurin hevur hugsjónina, at skjót hjálp er dupult hjálp. Tí má politikkurin lagast eftir hvørjum einstøkum fólki og teirra tørvi.

# Skal Sjálvstýrisflokkurin nú beinast av vegnum

**Sigvald Zachariasen**
*Valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Norðstreymoy*

– bert tí, at allir hinir flokkarnir nú tykjast hava funni útav, at Sjálvstýrisflokkurin í heili 96 ár hevur havt tann rættasta og besta politikkin? Tann politikkur, sum í 2002 er einasti vegur fram?

Skilji væl, at samfelagsfrøðingur setur spurnartekin við miðjuna, og Sjálvstýrisflokkin í føroyskum politikki. Hann metir sjálvsagt, at har kann ikki vera pláss fyri øllum flokkunum??. Og hann má vera bæði bilsin og spurin, tí nú vilja allir flokkar føra tað fram, sum hesin gamli flokkur hevur ført fram í útvið 100 ár, uttan at hava veri hoyrdur av mongum.

Havi lisið nakað av tí ið onkur valevni hava skriva, og royna at lovað til komandi løgtingsskeið, vera tey vald. Men hetta er stórtsæð tað sama umaftur. Havi eisini lýtt á í útvarpið og sjónvarpið, tá hesi sum ídag mannað Føroya Løgting hava fingi fatur á mikrofon og myndatóli, og er hetta eisini stórtsæð tað sama umaftur. Men tó er ein markant broyting.

**Sjálvstýrisfólk gleðast.**
Tað sum vit sjálvstýrisfólk gleðast stórliga yvir, er flokkanna ásjón til sjálvstýrismáli. Nærum allir flokkarnir sum stilla upp til hetta val, og hava stillað í mong Harrans ár, eru sprotnir úr Sjálvstýrisflokkinum. Tað sum merkir teirra útsagnir ídag, um eina hóvliga sjálvstýristilgongd eftir miðjuni, minnir ikki sørt um onkran sum viltist av leið. Men eftir at hava funni útav sínum skeivu hugsanum, (og eftir mong ár í sjálvstýris útlegd), eru teir so smátt um smátt, við at koma aftur á ta góðu gomlu slóðina. Hetta skrivi eg tí, at tað sum hendi var jú, at onkur fann útav, at vóru øll á einum máli um eina sjálvstýristilgongd, so fall áhugin fyri politikki. So her ráddi um at vera snildur, og finna uppá okkurt sum kundi sundurskilja Føroya fólk, ja, fáa mestsum klandur í, tá tosað verður um politik. Tað gjørdist so við, at onkur fór og segði fyri fólki, at einasti vegur fram er, at lønin má vera lág fyri, at vinnulívi skal klára seg. Tá reistist onkur annar úr stólinum, og segði, at vit mugu hava ein sokallaðan arbeiðaraflokk. So fekk man fólk at tjakast (klandrast) um tað.

Sambandsflokkurin hevði jú leingi verið til, og so fann onkur uppá, at um vit øsað fólk og siga loysing fyrst, so fer fólk eisini, at tjakast (klandrast) um tað.

Men góði gamli neistin í teimun rætthugsandi sjálvstýrisfólkum í Føroyum, slóknaði ongantíð heilt, hóast gøtan mangan hevur verið tung í hesi 96 ár flokkurin hevur á bakið. Og tað bæði fløvar og gleðir okkum sum yngri eru, og sum fyri nøkrum árum síðani, hava valt at stuðla hesa hóvligu sjálvstýristilgongd eftir miðjuni, at allir teir sokallaðu stóru flokkarnir, sum eiga sínar røtur í Sjálvstýrisflokkinum, nú koma krúpandi inn aftur til høvuðsrótina í føroyskum politikki.

**Er eingin skomm skapt í teimum?**
Allir flokkarnir eru jú vælvitandi um, at tað sum rørir seg í fólkinum í Føroyum í dag, er spurningurin um føroyskt sjálvstýri, fíggjarligt frælsi, innanfyri ríkisfelagsskapin, ella uttanfyri ríkisfelagsskapin. Tí eru hinir flokkarnir púra greiðir yvir, at skulu teir hava nakran møguleika til komandi val, er bara ein vegur, og hann er tann, sum eg áður havi nevnt, nevniliga, at venda aftur á slóðina hjá Sjálvstýrisflokkinum. Tað má vera ein ótrúliga stórur kamelur at svølgja, hjá teimun øllum somlum. Men sum dunaligir komediuspælarir teir eru, og hartil ósmædnir, hepnast tað teimun allarhelst, at goyma ta stóru skomm teir mugu ígjøgnum. Teir gera alt sum stendur í teirra makt, at skriva við so stórum bókstavum sum tilber á sínar greinir og herðar, "VIT VILJA HAVA FØROYKST SJÁLVSTÝRI, EFTIR LEISTI SJÁLVSTÝRISFLOKSINS". Men tó mugu teir jú, fyri skomm skyld skoyta uppí, "MEN VIÐ NØKRUM HEILT SMÁUM BROYTINGUM". Jú, eg meini tað.

**Nú skriva øll um búskap, og fíggjarligt frælsi, men**
Hví hava vit ikki ein sterkan búskap, og fíggjarligt frælsi?

Tað sum hevur darvað okkara búskapið almikið í nógv ár, er nevniliga sundurskiljing av samfelagsbólkum. Sambandsflokkurin hevur ført sera harliga fram, at samband er fyritreytin fyri einum tryggum samfelag, og harvið eru so fleiri samfelagsbólkar gloymdir, tí orka hevur ikki veri til at hugsað um teir eisini. So teir seta alt annað í aðru og triðju røð.

Tjóðveldisflokkurin hevur líka harliga ført fram, loysing frá dønum fyrst, so eisini teir seta alt annað í aðru og triðju røð.

Javnaðarflokkurin sigur seg vera ein sosialan flokk, so harvið setað eisini teir aðrar sera týdningarmiklar samfelagsbólkar í aðru og triðju røð.

Fólkaflokkurin hevur síðan teir fóru burturúr Sjálvstýrisflokkinum sagt, at bert vit hava vinnulívið koyrandi, so skal tað nokk gangað. Men teir gloyma ALLAR hinar samfelagsbólkarnar, so tað er beinleiðis láturligt, at teir nú siga, at um teir koma við í eina komandi samgongu, vilja teir hava sosialmál.??

Miðflokkurin, ja hann gloymir altmøguligt, og so er einki meir at siga um tað.

Propagandapolitikkur tá hann er best, allan samlan vegin ígjøgnum.

Hetta er tann beinleiðis orsøkin til, at Føroyar ikki hava ein sterkan búðskap. So hvussu kunnu hesir omanfyri nevndu flokkar hava nakra sum helst visión um ein sterkan búskap? Teir hava nevniliga ikki ánilsi av øllum, sum er til í einum samfelag. Tað hava undanfarin ár týðiliga borið prógv.

Sjálvstýrisflokkurin hevur sum tann einasti altíð roynt, at víst á, at um vit skulu byggja land, mugu vit takað allar samfelagsbólkarnar við, ALTÍÐ, alt frá stórstu inntøkukeldu, og allan vegin niður til tann, sum av eini ella aðrari orsøk, hevur alla okkara hjálp fyri neyðini. Bert á henda hátt, kunnu vit kenna okkara veruligu inntøkur og útreiðslur. Og tá vit vita munin á inntøkum og útreiðslum, tá kunnu vit harífrá byggja land og búðskap. Hetta hevur fyri Sjalvstýrisflokkin einsamallan, veri ein sera røtt, men tung hugsjón at borið, nevniliga, at onki má gloymast, alt má takast við undir einum, fyri at kenna okkara búskaparstøðu. Tí hevur flokkurin eisini veri tað trygga sambindingarliði, í teimun allarflestu samgongum ígjøgnum árini. Hetta fyri, at tryggja allar samfelagsbólkar so væl, sum tað yvirhøvur hevur veri gjørligt.

**Góðu veljarar**
Til tykkum sum ígjøgnum árini eru blivin lumpaði til, at takað eina støðu til vinstru ella høgru, ella eina støðu um loysing ella samband, komi inn á miðjuna og velji Sjálvstýrisflokkin, her finst tann elsti, mest royndi, og mest brúkbari politikkur fyri samfelagið Føroyar. Ein serlig heilsan til tykkum ungu, sum kanska ikki enn hava funni tykkara hugsjón í øllum meldrinum, og sum kanska fara á val fyri fyrstu ferð, geri bara sum allir flokkar siga í 2002, "miðjan í politikki, er einasta gongda leið", vel ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á Føroya Løgting.

Set KROSS við lista D.

# Frælsi til at velja!

**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*

Í ríkisfelagsskapinum hava vit møguleika at velja til og frá – fara vit út, hava vit valt frá!

www.samband.fo





VALGREINAR

# Økismenningarpolitikkur

**Birgir Mohr**
*Valevni Javnaðarfloksins í Sandoynni*



Javnaðarflokkurin vil menna økini, so alt ikki endar í Tórshavn!

Eitt tað løgnasta málið seinastu tíðina er málið um fiskaaling í Sandoyar økinum. Ein lívfiskastøð kom í nítiárunum í Skopun og gevur henda trí heilársverk í arbeiðið. Alt gott um tað.

Men afturfyri noktar Vinnumálastýrið Sandoynni nakað vanligt aliloyvi, tí skal Sandoyggin bert vera til at ala lívfisk – bæði uppi á landi og úti á fyrunum ? Hettar halda vit ikki vera rætt, sum her búgva !

Eitt felag hevur søkt um loyvi til at ala á Sandsvág, men fingið korta-nei til svar frá Føroya landstýri. Sandsvág liggur umleið 10 km. frá lívfiskastøðini í Skopun. Meðan tað er stitri bæði til Hest og til Gomlurætt, og bæði hesu støðini er loyvt at hava vanligar aliringar liggjandi? Hettar undrar okkum stórliga, sum her búgva.

Trí arbeiðspláss untist Sandoyar-økinum burtur úr allari alivinnuni – tað er ikki nógv? Vit vóna, at eitt nýtt landstýri eftir valið kann broyta hesa avgerð, so vit her fáa normal viðurskiftir á hesum øki, og sama møguleika til hesa vinnu, sum aðrir føroyingar.

Tað man vera ivasamt, um Føroya Landstýri hevur rætt til at skerja okkara møguleikar so álvarsliga, at vit nú eru eftirbátar á hesum vinnuøki? Og hvat eiga vit so at fáa afturfyri ella ístaðin???

Eitt annað øki, hvar vit her eru aftanfyri hinu størri økini í Føroyum, er, at vit eiga onga íttrottarhøll til okkara ungdóm, og leingi hava vit tosað um at fáa eina slíka til vega. Ein slík høll er fyrst og fremst ein íløga í, og til, okkara ungu, men kemur okkum øllum væl við.

Sands kommuna setti skjøtil á í ár, við at avseta pening á fíggjarætlanini til endamálið. Vit meta ikki hettar tiltakið sum óyvirkomuligt mál at røkka, stendur øll oyggin saman um málið.

Ein orsøkin til at raðfesta hettar málið nú er, at studningur er avsettur á Løgtingsins fíggjarlóg til slíkt endamál, og vóna vit at fáa ein part harav.

Inni í Dal liggur Sandoyar Meginskúli, har liggur eisini graslíkisvøllurin, og har búðleikast Sandoyar Ítróttarfelag, B.71. Hesu aktiv eiga Kommunurnar í Sandoynni og Sandoyar fólk í felag.

Í hesum umhvørvi er tað tí upplagt at leggja eina íttróttarhøll, og har er í bygdaplaninum avlagt øki til slíkt endamál.

Lat okkum nú standa saman um at fremja hettar stóra tiltak til gagns fyri tey yngru og gleði fyri okkum øll.

Borgarar á Sandi hava víst á tørvin fyri at bøta um bygdaskúlan, og tey hava púra rætt. Og tá vit nú hava raðfest ítróttarhøllina í ár, fram um bygdaskúlan, er tað eisini tí, at eingin studningur er avsettur á Løgtingsins fíggjarlóg til skúlabygging, og einki projekt fyriliggur.

Bæði á Sandi og í Skopun, kanska arðar staðir við, er tørvur á at bøta um skúlaviðurskiftini, men fyrst má greiða fást á, um tað skal byggjast út upp á verandi skúlar, ella heilt nýggir skúlar vera at byggja.

Skullu hesar heldur smáu kommunurnar undir at byggja nýggjar skúlar, so gerst hettar neyvan uttan studning frá landsins fíggjarlóg. Tí má virkast fyri, at slíkar avsetingar koma aftur á Løgtingsins fíggjarlóg. Og skúlar til yngstu flokkarnar, vilja allar bygdirnar hava.

Javnaðarflokkurin hevur altíð raðfest skúlaverkið so frammarliga sum gjørligt, og vit meta tað vera eina landsuppgávu at syrgja fyri, at allir føroyingar fáa eins góða og holla skúlagongd.

JAVNAÐARFLOKKURIN vil menna økini. Javnaðarflokkurin sigur: FÓLKIÐ FYRST. Veljið tí JAVNAÐARFLOKKIN.

# Tjóðveldisvalevni setur met í ósannindum!

**Finnleif Guttesen**
*Sambandsvalevni í Suðuroy*



Í Sosialinum nr.58. hevur Ólavur Rasmussen grein um, hvussu ússaligir føroyingar eru.

Tað má sigast at vera lítið sømuligt fyri Ólav at siga so nógv ósatt um sítt egna fólk.

Ólavur ger tað sama, sum flest øll loysingarfólk gera, hann leitar ávíkavist 186 og 150 ár aftur í tíðina og greiðir frá, hvussu politisku viðurskiftini vóru tá, og hvussu lítið er broytt rætta vegin, hóast vit í dag skriva 2002.

Ólavur skrivar, at føroyingar sáða mistreysti niður í fólk, at vit orka einki, megna einki, eru einki.

Ólavur skrivar eisini í triða persóni - nú vil hann ikki skriva um seg sjálvan, men bert um øll hini, og hann lýsir tað soleiðis:

»Tit fabla um ney og armóð«. Og við ungdómin siga tit: »gangið ikki, men grulvið«. »Havið ikki áræði, men latið óttan stýra tykkara lívsleið«.

Álvaratos, hvussu kann nakar fara so illa við sínum næsta?

Eg taki veruliga synd í Ólavi, sum veit so lítið gott at siga um føroyingar og serliga um tey ungu, men eg kann ugga meg við, at alt sum Ólavur skrivar er beinleiðis ósatt.

»Tit fabla«, skrivar Ólavur. Kann vera, at onkur fablaði í 1816 ella 1852, men í 2002 er tað Ólavur, sum fablar (orðabókin: fable = møsna).

Tá ið Ólavur ikki kann síggja annað enn neyð og armóð í Føroyum, mega vit onnur royna at hjálpa honum, so hann kann síggja sítt egna land og fólk við einum ljósari sinni.

# Viðmerking til grein í Sosialinum

**Eivind Jacobsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Sambandsflokkurin ynskir at hækka fólkapensjónina. Men framtíðar pensjón má bíða til nútíðar pensjónin er komin upp á hóskandi støð

Sosialurin skrivaði í grein hósdagin frá tíðindafundi hjá Sambandsflokkinum. Okkurt av hesum kundi misskiljast. Hesar reglur verða skrivaðar fyri at beina allan iva av vegnum.

Til heystfund Sambandsfloksins var gjørt eitt upplegg um pensjónir. Hetta er í dag partur av valskrá floksins, sum kann lesast á heimsíðuni hjá Sambandsflokkinum. Har stendur, eins og greinin í Sosialinum sigur, at Heimsbankin hevur uppskot um hvussu vit fíggja pensjónir í framtíðini. Men Sambandsflokkurin hevur ongantíð sagt, at hann ynskir at fremja hesa loysn í verki. Sambandsflokkurin vil ikki verða við til at skunda hetta álvarsmál ígjøgnum. Sambandsflokkurin fer undir ongum umstøðum at seta eina skipan í verk, sum fagfeløg og onnur ikki taka undir við.

Semja var í heyst og er framvegis í Sambandsflokkinum um, at tað fyrsta, sum má loysast er pensjónin til tey, sum í dag eru pensjonistar. Tá hesin trupulleiki er loystur kunnu vit tosa um framtíðar pensjónsskipan. Tá kann uppskot Heimsbankans brúkast sum ein byrjan. Men lat okkum fyrst fáa fólkapensjónina í seyðahøgan stand.

Pensjónirnar í Føroyum eru alt ov lágar. Til samanberingar kann nevnast, at stakur pensjonistur í Danmark fær eftir skatt kr. 9.200,- um mánan. Stevnuskrá Sambandsfloksins sigur, at pensjónin í Føroyum eigur at verða á hædd við hana í grannalondunum.

Niðurstøðan av hesum er, at Sambandsflokkurin raðfestur soleiðis:

1. Fólkapensjónin skal verða eins stór og í grannalondunum
2. Fólk skulu eins og í dag hava møguleika fyri at tekna egna pensjónsuppsparing.

Aðrar skipanir og framtíðar pensjónsskipanir verða viðgjørdar tá fólkapensjónin er komin upp á hóskandi støði.

# Við ella ikki?

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Tjóðveldismenn plaga at rógva upp undir, at vit ikki eru í parti við Danmark.

Onkur teirra sigur okkum vera part av Norra, onkur sigur at vit eru í vanda fyri at melda okkum inn í Danmark, um vit atkvøða nei til fullveldi.

Sannleikin er tann, at vit eru í einum samveldi við Danmark – og Grønland – sum vit kalla danska ríkið, ella ríkisfelagskapin.

Vit eiga rætt til at velja, um vit vilja vera fullkomiliga óheft, ella vit vilja vera í samveldi. Við at samtykkja heimastýrislógina, við at velja fólkatingsmenn, við at yvirtaka eftir heimastýrismlógini hava føroyingar góðtikið at vera í einum samveldi við Danmark.

Seinastu føroyingar, ið hava góðtikið hesa støðu eru Høgni Hoydal, Tórbjørn Jacobsen, og Sjúrður Skaale. Teir hava yvirtikið eftir heimastýrislógini. Teir hava stillað upp til fólkatingsvalið. Og teir hava gjørt løgmanni greitt, at teir einans standa til svars fyri sínar veljarar – ikki yvir fyri føroysku stjórnini.

Vit sambandsmenn góðtaka 100%, at Føroyar sum land og føroyingar sum fólk eiga ómissandi sjálvsavgerðarætt, og at hesin rættur kann brúkast til at taka fullveldi.

Men tjóðveldismenn góðtaka ikki, at vita eiga rættin at umbestemma okkum. Teir góðtaka heldur ikki, at vit kunnu brúka rættin at vera í einum ríki, einum samveldi av egnum fríum vilja.

Við atburði okkara eru vit við í tí felagskapinum, sum kallast "kongaríkið Danmark" – allir føroyingar sum ein. Men bara summi av okkum hava dirvi og erligheit nokk til at ganga við limakortinum í bringulummanum!